# Elin tekur sær av stjørnunum

**Tað fyrsta, ið stóru fótbóltsstjørnurnar síggja, tá tær koma út gjøgnum tollin á Flogvøllinum, er smílandi snýðið á Elin Christiansen. Hon hevur nevniliga í fleiri ár starvast sum guide fyri fótbóltssambandið. Hetta arbeiðið áleggur henni at fylgja við útlendsku liðunum og syrgja fyri, at umstøðurnar eru í lagi, og at alt gongur sum tað skal**

LANDSLIÐ
*Eydna Skaale*
*eydna@sosialurin.fo*



*23 ára gamla Elin Christiansen úr Havn hevur í hesum døgum úr at gera við at renna fyri fronsku stjørnurnar. Hon skal syrgja fyri at alt er í lagi hjá teimum*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

Fyrstu ferð Elin arbeiddi sum guide hjá nøkrum landsliði, var í 2000, tá NM kappingin fyri ungdómslið var hildin í Havn. Tá hevði Elin sjálvonnur ábyrgdina fyri norska ungdómslandsliðnum.

– Tað var av tilvild, at eg bleiv biðin at vera guide tá. Tað komu átta landslið til Havnina, og tey skulu øll hava ein kontaktpersón knýttan at sær. So tá manglaði FSF hjálparfólk. Onkur kendi onkran, sum kendi meg, og soleiðis kom tað í lag. Mær dámdi tað ógvuliga væl, og eg havi hjálpt til við landsliðum at kalla síðani, greiðir Elin Christiansen frá.

### Trupulleikaloysari

Tá landslið eru á vitjan hjá hvør øðrum eru nakrar ógvuliga strangar reglur, sum skulu fylgjast av vertunum. M.a., at ein lokalur persónur skal taka sær av og fylgja við gestaliðnum allatíðina.

– Mín uppgáva er at vera millummaður ímillum Fótbóltssambandið og útiliðið. Áðrenn teir koma, fái eg eina ógvuliga neyva skrá frá FSF, har allar venjingar, máltíðir o.a. er skrivað upp. Men onkuntíð ynskja teir at broyta skránna. Til dømis vilja teir ikki venja á teimum tíðunum, sum FSF hevur givið teimum, ella teir vilja sleppa ein sightseeing túr, ið ikki er tilrættislagdur frammanundan. Øllum tí skal eg taka mær av og fáa í lag, sigur Elin.

Hon skal sostatt lofta øllum trupulleikum, sum stinga seg upp, og loysa teir.

Hon sigur, at hon er biðin um mangt og hvat hesi árini, hon hevur verið guide.

– Mín arbeiðsdagur er frá 9 um morgunin til 22-23 um kvøldið. Og tá havi eg kanska ein hálvan tíma pausu ígjøgnum allan dagin. Og tú veist ongantíð hvat tú kanst koma út fyri, tí tað avhongur av, hvat gestirnir ynskja. So tað er strævið, staðfestir Elin.

Hon sigur, at hon hevur gjørt alt frá at keypa sjokoláту tíðliga um morgunin fyri túsindavís av krónum, skaffað pressukort til yndis journalistarnar hjá venjarunum, til at renna ørindi og vera sightseeing guide á einum busstúri, sum hon sjálv skipaði fyri. Hon leggur flennandi afturat, at tíbetur hevði hon ein góðan busssjaførr, sum visti nógv at fortelja um tað, tey sóu.

– Einaferð var eg við einum liði á veg inn á Svangaskarð, har dysturin skuldi vera. Men tá vit høvdu koyrt eina góða løtu, kom málmaðurin í tankar um, at hann hevði gloymt málmanshandskarnar eftir á Hotel Føroyum. So eg mátti fara av bussinum, saman við einum liðleiðara, meðan liðið helt leiðina fram til Toftir. So at ringja og fáa fatur í onkran, sum kundi koma eftir okkum og koyra okkum eftir handskunum og síðani inn á Svangaskarð, minnist Elin.

### Tey smærru krevja meiri

Síðani hon fyri fyrstu ferð var guide hjá norska U-15 landsliðnum, hevur hon tikið sær av nógvum landsliðum. Hon hevur verið guide hjá Sveits, Luxemburg, Slovenia, Skotlandi, Íslandi, Týsklandi, Litavia, Malta, Kasakstan, Licthenstein og í hesum døgum rennur hon eisini fyri fronsku stjørnurnar.

Hon sigur, at tað er ógvuliga ymiskt, hvussu nógv hesi ymisku liðini forlanga og vilja broyta.

– Rudi Völler, venjarin hjá Týsklandi var óalmindiliga fittur at arbeiðia saman við. Eisini venjarin hjá Fraklandi, Raymond Domenech, er sera lættur at hava við at gera, greiðir Elin frá. Hon hugsar eina løtu, áðrenn hon heldur fram, – Faktiskt er tað so, at tað eru tey smærru liðini, ið eru tey strævnastu at arbeiða fyri. Tað vísir seg ofta, at teir venjararnir eru strangari og ynskja fleiri broytingar, enn tey størru liðini gera. Men tað hevur sikkurt eisini sínar forkláring-ar, heldur Elin.

Størru liðini hava kanska ikki sama trýstið á sær, tá tey koma til Føroya, sum tey smærru liðini. Tað er eisini lættari hjá smáu liðunum at broyta skránna.

– Tey stóru liðini, sum t.d. Frakland, hava nógvar stjørnur í heimsklassa. Tey hava tí eisini nógv security fólk við, sum skulu fylgja liðnum allastaðni. Tað krevur eitt nógv størri arbeiði at skula broyta okkurt hjá teimum, enn um tað bara er eitt lið við ongum stjørnum, og harvið ongum security fólki afturat, sigur Elin.

Hon sigur, at trupulleikin við hesum smáu eysturlendsku londunum ofta er hann, at tey duga sera illa at práta enskt. Og tá kann tað gerast trupult at hjálpa teimum.

– Á liðnum hjá Kasakstan, var bert ein, ið dugdi eitt sindur av enskum. Hinir prátaðu kasakstanskt við meg, sigur Elin. – Men tað gekk allíkavæl við teknmáli og góðum vilja.

Hon heldur eisini, at tá liðini síggja at man roynir at vera professionellur og at gera alt fyri tey, so vera tey meiri takknemmilig og minni forlangandi.

– Tú ert tað einasta kenda andlitið í landinum fyri hesi fólkini, og tey blíva ofta góð við teg. Serliga liðleiðararnir, sum eg havi mest við at gera. Eftir eina tíð verða teir ofta bekymraðir um meg. T.d. spyrja teir um eg havi etið og bjóða mær við til borðs, tá liði fer at eta, sigur Elin.

At liðini veruliga eru takknemmilig fyri tað stóra arbeiðið, hon ger, merkir hon eisini.

– Eg royni at gera tað, sum teir ynskja. Um tað er ein trupulleiki, so loysi eg hann við einum smíli. Tað ger alt nógv lættari. Men eg fái eisini fantastiska hjálp frá FSF, sum eg altí ð kann ringja til, um á stendur, sigur hon.

### Tann ringa síðan

Men tað er ikki altíð bara stuttligt at vera guide. Elin verður nevniliga eisini ofta millumlið ímillum stjørnurnar og føroysku fjepparnar.

– Tað er ræðuliga ringt at nokta hesum fittu smádreingjunum, sum eg ofta kenni væl, at sleppa í kontakt við hesar stóru fótbóltsspælararnar. Men tað eri eg noydd til. Týsdagin, tá Frakland skuldi venja á Tórsvølli vóru eini 200-300 børn komin saman, og vildu sleppa inn í bussin til leikararnar. Leikararnir mundu ikki sloppið at vant, tí børn vóru allastaðni. Tá mátti eg vera tann óreina, sum kúsjaði børnini burtur, og noktaði teimum at møta idolunum, greiðir Elin frá.

Hon sigur, at tað er ein partur av hennara arbeiði, sum hon noyðist at gera.

– Nógv børn vórðu rasandi inn á meg, og tað vóru fleiri mammur eisini. Men hatta er mítt arbeiði. Um leikararnir ikki sleppa framat vøllinum, verða security-menninir hjá teimum í øðini, og tað gongur í fyrstu atløgu út yvir meg, og í aðru atløgu út yvir FSF. Tí tað stendur øllum útiliðum frítt at klaga til FIFA um fótbóltsuppihaldi í einum øðrum landi ikki hevur verið nøktandi, sigur Elin.

Hon sigur, at tað tók Thierry Henry einar 15-20 minuttir at ganga frá bussinum og oman til vøllin. Og tað er ikki nøktandi.

Hóast tað, so heldur hon at liðini sum oftast hava verið sera nøgd við uppihaldið í Føroyum.

– Eg havi ongantíð spurt um autograf frá nøkrum spælara, men allíkavæl havi eg fingið nógvar. Tá Týskland var her, góvu teir mær eina landsliðstroyggju við øllum autografunum á. Eg havi fingið gávur, e-mailar ella blómur frá øllum liðunum, sum hava verið her. Tað er ein góð kensla, at tá tú hevur gjørt alt, sum tú hevur kunnað fyri hesi liðini, at tey so eisini vísa, at tey eru takksom, sigur Elin Christiansen at enda.

Telefonin hevur ringt fleiri ferðir, ímeðan vit hava tosað, og nú má hon skunda sær niðan á Hotel Føroyar, at taka sær av stjørnunum, áðrenn dystin í kvøld.

## Rætting

Í blaðnum í gjár stóð at Randi Vang og Jónhild Johannesen stóðu fyri tiltakinum Hendur og Hugflog. Hetta er sjálvandi ikki heilt rætt, tí tað var í samstarvi við Menningarstovuna og Føroya Heimavirkisfelag.

**eys**



Hjáveiðan hjá nótaskipum:

# - Vit hava ikki nóg gott grundarlag

**Eftir at tað er komið fram, at eitt nú íslendsk nótaskip, sum royna við troli, hava havt eina ávísa hjáveiði av toski, hevur Fiskiveiðieftirlitið kannað, um hjáveiða eisini er í veiðini hjá føroysku nótaskipunum**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*



*Fiskiveiðieftirlitið hevur staðfest, at føroysku nótaskipini hava eina ávísa hjáveiði, men enn er ov tíðliga at siga, hvussu nógv talan er um. Myndin, sum er av Tróndi í Gøtu, er tilvildarlig*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

Tað hevur nevniliga ljóðað, at hjáveiðan hjá íslendskum nótaskipum stundum hevur verið so stór, at skipini hava verið noydd at siglt undan toski.

Áður hevur veiðan hjá nótaskipunum verið rættiliga rein, men síðan tey nýggju skipini, sum hava rættiliga stóra tóvmegi, eru vorðin effektivari, er uppíblanding av øðrum fiskasløgum vorðin ein ávísur trupulleiki.

Nevnt hevur eisini verið, at ein onnur orsøk til, at toskur og upsi í størri mun eru uppi í veiðini hjá nótaskipunum, er, at fiskurin hevur havt ov lítið at eta, og at hann tí gongur uppi í svartkjaftinum.

### Veikt grundarlag

Elmar Højgaard, leiðari á Fiskiveiðieftirlitinum, sigur, at teir í summar hava gjørt nakrar kanningar av nótaveiðini hjá føroyskum skipum, men grundarlagið er ov veikt til tess, at hann dugir at siga, hvussu stórur ella lítil trupulleikin við hjáveiði er.

Sum skilst, er lítil svartkjaftur veiddur í føroyskum sjógvi, síðan Fiskiveiðieftirlitið fór undir sínar kanningar. Men stovnurin hevur kannað lastir, ið skipini, sum hava veitt í íslendskum sjógvi og altjóða sjógvi, hava lagt upp í Føroyum. Í summum førum hava hesi skip fiskað ein part av veiðini í føroyskum sjógvi, men meginparturin er veiddur í íslendskum sjógvi og altjóða sjógvi.

– Jú, vit hava gjørt nakrar kanningar, men eg haldi, at grundarlagið er ov veikt til tess at gera nakra niðurstøðu. Tískil fara okkara kanningar av hesum viðurskiftum at halda fram.

Elmar ásannar, at føroysku nótaskipini hava havt eina ávísa hjáveiði, men hann torir ikki at geva nakað boð uppá, hvussu stór hendan er.

Hann heldur ikki, at talan er um prosentir, men vil kortini ikki hefta seg við nakað tal, tí enn er ikki komið á mál við kanningunum.

### Stórar nøgdir

– Fiskurin verður pumpaður upp í skipini, og tá ið hann verður landaður, fara eini 120 tons eftir band-inum um tíman. Tað einasta, vit kunnu gera, er at eygleiða fiskin og taka myndir av tí, vit síggja. Nøgdirnar eru so stórar, at ógjørligt er at taka hjáveiðina burtur úr samlaðu veiðini.

Hann sigur, at Fiskiveiðieftirlitið arbeiðir við at gera tað lættari at kanna hjáveiðina hjá nótaskipunum, og hann væntar, at grundarlagið undir metingini verður betur sum frá líður.

– Tá ið nógvur fiskur er at fáa, er skjótt at fylla skipini, harav tey størstu taka eini 2500-2700 tons. Er minni at fáa, sum tað hevur verið í seinastuni, verður tóvað leingi um stór økir, og eg trúgvi, at tað serliga er í slíkum føri, at hjáveiða er uppi í fiskiskapinum hjá nótaskipunum, sigur Elmar.

Hann sigur, at tað, sum Fiskiveiðieftirlitið hevur sæð uppi í veiðini hjá føroysku nótaskipunum, serliga er góður og miðalgóður upsi, kongafiskur og rognkelsi.

– Hinvegin hava vit sæð lítið av toski, sigur hann.

Elmar Højgaard sigur, at vanliga plagar fiskiskapurin eftir svartkjafti í føroyskum sjógvi at taka seg uppaftur síðst í september, og tá fer Fiskiveiðieftirlitið eisini at hava eyguni eftir møguligari hjáveiði.

# So er farið at halla við havhestinum

FUGLAVEIÐA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*



*Hendan myndin er tikin norður úr Ennibergi á havhestaveiði í ár*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

Nú man havhestatíðin sigast vera farin at halla, hóast enn ikki er farið av allari tíð.

Veðrið í havhestatíðini í ár hevur verið, sum tað plagar, um vit so kunnu siga; onkur góður dagur hevur verið, men fleiri dagar hevur verið ov fRískur vindur.

Hjá teimum, sum vóru eftir havhesti í bestu tíðini og fingu teir bestu dagarnar til veður, vignaðist hampiliga væl. Aðrir, sum ikki sluppu avstað teir góðu dagarnar, men noyddust at velja sær ein dag við ov nógvum loti, vignaðist minni væl.

Og soleiðis er tað vanliga á hvørjum ári.

Teir bestu dagarnar fingu menn upp í fleiri hundrað havhestar, men í hesi vikuni hevur lítið verið at fingið, tí nú er so nógv útliðið.

Týsdagurin og mikudagurin í síðstu viku vóru tveir góðir dagar, og tá fingu menn nógvan fugl.

# Runavíkar býráð samtykti at viðmæla skeinkiloyvi

MATSTOVUVIRKSEMI
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*



*Runavíkar býráð samtykti at viðmæla umsóknini um skeinkiloyvi í hesum hølunum, har nýggj matstova ætlandi letur uppaftur til heystar*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

Á býráðsfundi týsdagin samtykti Runavíkar býráð við seks atkvøðum fyri og einari ímóti at viðmæla eini umsókn um skeinkiloyvi í sambandi við matstovuvirksemi í hølunum, har John's Resturant áður helt til í Saltangará.

Uppgávan hjá býráðnum er at gera sítt ummæli av umsóknini, og síðan er tað Loyvisnevndin, sum eigur avgerðina, um loyvi skal gevast ella ikki.

Rodmundur Nielsen, borgarstjóri, sigur, at tá ið býráðið í hesum førinum hevur samtykt at viðmæla umsóknini, plagar Loyvisnevndin at fylgja tilmælinum.

Tí væntar hann, at tað gongur ikki long tíð, til ein matstova aftur letur upp í Runavíkar Kommunu.

Síðan John's Resturant læt aftur í apríl, og Runavíkar Sjómansheim læt aftur, 1. september, hevur einki matstovuvirksemi verið í triðstørstu kommunu í landinum.

Men nú bendir so alt á, at Stokkastovan í Saltangará letur uppaftur við matstovuvirksemi og skeinking.